# Rás2 flytur til London



*Í næstu viku bjóðar Rás2 føroyingum beinleiðis radio úr London*

**Í næstu viku fer Rás2 at senda morgunsendingar og seinnapartssendingar beinleiðis úr London**

RÁS2
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í næstu viku verður metropolurin London miðdepil fyri sendingar á Rás2. Frá týsdegnum og fram til fríggjadagin sendir Rás2 úr enska høvuðsstaðnum.

Rás2 fer í sínum sendingum at hitta føroyingar, sum eru búsitandi í London. Tosað verður við hesi fólk um teirra gerandisdag, um teirra avbjóðingar og teirra lív í fremmandum stórbýi. Rás2 hittir eisini bretar á máli um lív og levnað í London, enskir tónleikarar fara at spæla live og vitjað verður ymsastaðni í London.

Rás2 fer at hava studio mitt í London, og har fara fólk at leggja leiðina fram við og práta við vertirnar. Eisini fara Rás2 fólkini út í býin at hitta føroyingar og bretar, og onkrar reportasjur verða eisini gjørdar úr London.

Millum teirra, sum Rás2 fer at hitta í London, eru Elisa Heinesen, Helgi Joensen, Dánjal Rein, Marita Thomsen, Kjartan Hoydal og Áki Johansen.

Tey, sum gera sendingarnar úr London, eru Eyðun Klakstein, Barbara Holm og Alvin Ellebye Andersen.

Rás2 sendir morgunsendingar úr London týsdag, mikudagin, hósdagin og fríggjadagin frá klokkan 9 til 12. Seinnapartssendingar verða á skránni týsdagin, mikudagin og hósdagin frá klokkan 15.10 til 17.00.

STARVSLÝSING



## Akademikari

Heilsufrøðiliga starvsstovan søkir eftir akademikara til matvørudeildina. Umsóknarfreistin er 2. mars 2010.

Les nærri á www.hfs.fo

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

UMHVØRVISVIKAN
10.-16. MAI 2010

# Stuðul

Tórshavnar kommuna veitir stuðul á hvørjum ári til heilsu- og umhvørvistiltøk.

**Stuðul verður latin til verkætlanir sum:**

- Menna vitanina um heilsu og/ella umhvørvi
- Virka dálkingarfyribyrgjandi og/ella avmarkandi
- Virka orku – og tilfeingissparandi
- Kunna almenningin um heilsu- og/ella umhvørvisviðurskifti
- Verja landsløg, djóra- og/ella plantusløg

Til ber hjá stovnum, virkjum, feløgum og einstaklingum at søkja um stuðul.

Umsóknarblað og reglugerð fáast á www.torshavn.fo ella í Snarskivuni.

Umsóknir skulu verða hjá Tórshavnar kommunu í seinasta lagi 1. apríl 2010 og skulu sendast til:

**Tórshavnar kommunu**
heilsu- og umhvørvisdeildin
Postboks 32 • 110 Tórshavn

Stuðulin verður latin í umhvørvisvikuni, sum verður 10. til 16. mai 2010.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA